## Ráðstevna um burturkast

Í november verður norðurlendsk ráðstevna í Føroyum um burturkast frá skipum og móttøkuskipanir í havnum. Ráðstevnan, ið er stuðlað av Norðurlendska ráðharraráðnum, verður hildin á Hotel Føroyum. Heilsufrøðiliga starvsstovan samskipar tiltakið, og roknað verður við luttakarum úr øllum Norðurlondum. Ráðstevnan er opin fyri øllum, men vendir sær serliga til manningar, reiðarar, havnarfútar, skipaeftirlit og onnur, ið vara av hesum.



## Fyrispurningur um happing

Heidi Petersen, løgtingskvinna, hevur sett Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni í mentamálum ein skrivligan fyrispurning viðvíkjandi tiltøkum móti happing í fólkaskúlanum. Hon spyr landstýrismannin, hvat hann ítøkiligt ætlar at gera við, at á leið 1000 næmingar í Føroyum, sambært nýggjari kanning, verða happaðir, um landsstýrismaðurin hevur nøkur langtíðarmál fyri at basa happingini og hvussu hesi skulu gjøgnumførast. Eisini spyr løgtingskvinnan um landsstýrimaðurin hevur nakra ætlan fyri, hvussu skúlaverkið kann hjálpa happaðum næmingum og foreldrum teirra, og hvussu nógvan pening hann ætlar at seta av til hetta økið á komandi fíggjarlóg.

# arskó



*- Teir ídnu og góðu lærararnir eru alla æru verdir, men vit mugu hava eitt lágmark, sum allir skúlar og allir lærarar skulu uppfylla. Tað kann ikki vera rætt, at barnið trívist í skúlanum, tí tað er so heppi at hava ein góðan lærara, sigur Anna Dalsgaard, trivnaðarráðgevi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

nokk. Hon greiðir frá, at hon stutt síðani vitjaði í tveimum føroyskum skúlaflokkum, har annar flokslærarin legði stóran dent á sosiala trivnaðin, meðan hin ikki legði so nógv í tað. Og munurin var øðiligur. Annar flokkurin virkaði sum ein eind og øll sóu út at trívast, meðan børnini í hinum flokkinum so at siga stóðu við rygginum upp í móti vegginum, tí onki samanhald og álit var.

- Men tað kann ikki vera rætt, at barnið trívist í skúlanum, tí tað er so heppi at hava ein góðan lærara, sigur Anna Dalsgaard.

- Teir ídnu og góðu lærararnir eru alla æru verdir, men vit mugu hava eitt lágmark, sum allir skúlar og allir lærarar mugu uppfylla.

### Okkurt má gerast

Anna Dalsgaard heldur, at eitt konkret tiltak, sum kundi verið sett í verk, var at koyra eitt royndarprojekt á nøkrum skúlum í trý ár.

- Nú er ætlanin at gera kanningina um happing aftur um trý ár. Tí er tað upplagt at seta eina royndarætlan í verk, har nakrir skúlar fáa játtan til at seta trivnaðin í hásæti.

Og ein slík ætlan kundi passandi brúkt nakrar av royndunum frá skúlaverkinum í Svøríki, heldur Anna Dalsgaard.

Umframt krøvini til skúlaleiðsluna og trivnaðartímar á skemanum, so hava allir svenskir skúlar eisini fleiri onnur tiltøk sum styrkja trivnaðin.

- Hvør skúli hevur eina skúlavertinnu. Hendan er ikki lærari, men er væl lærd í trivnaði. Hon hevur til uppgávu at taka móti fráboðanum um fráveru, gera kaffi til lærararnar, og hon hevur eisini fasta garðvakt í tí langa fríkorterinum. Hetta kann ljóða sum eitt strævið starv, men starvið er høgt í metum, tí hon hevur so stóran týdning fyri tryggleikan bæði millum børn og vaksin.

Allir svenskir skúlar hava eisini tveir serlærarar, sum bara hava til uppgávu at fara runt í klassunum og kannað trivnaðin og lofta trupuleikunum, áðrenn teir vaksa seg ov stórar. Og so hava allir svenskir skúlar bæði eitt næmingatoymi og eitt vaksnamannatoymi, sum skulu arbeiða fyri at teirra skúli er ein happingarfríur skúli.

- Hví ikki lata okkum hugvekja av einum slíkum undangongulandi, og hví ikki gera nakað við tað, so føroysk børn veruliga fáa umstøður at læra nakað í skúlunum, spyr Anna Dalsgaard at enda.



*Føroysku dreingirnir hava brúk fyri monnum, sum eru áhugaðir í at teir hava tað gott, sigur Anna Dalsgaard*

## Menn flýggja undan ábyrgd

**Fjórði hvør drongur í fimta flokki verður happaður, men mannligu lærararnir halda seg vekk frá skeiðum um trivnað og happing. Hetta er sera óheppi, heldur trivnaðarserfrøðingurin, Anna Dalsgaard**

HAPPING
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Í seinastu viku høvdu Náttarravnarnir bjóðað danska happiserfrøðinginum, Stig I. Sørensen, at halda fyrilestrar um happing. Tiltakið á Hotel Tórshavn var væl eydnað, og nógv fólk komu. Men einans tveir menn vóru til staðar, danski fyrilestrarhaldarin og ein føroyskur politistur, sum eisini skuldi hava eitt upplegg á fundinum.

- Tíverri er tað alt ov vanligt, at menn ikki fara til slík tiltøk. Eisini innan skúlagátt, halda mannligu lærararnir seg burtur, tá skeið eru um trivnað og happing.

Samstundis vísa allar kanningar – ikki bara í Føroyum - at drongir eru yvirumboðaðir bæði sum happarar og sum happioffur. Anna Dalsgaard dugir ikki at siga, hví hesin munur er, men hon heldur tað vera týdningarmikið, at vit taka mistrivnaðin hjá drongjum í álvara, og her hava menn eina serliga ábyrgd

- Um drongir høvdu menn at koma til, kundi tað verið, at trupulleikarnir vóru loftaðir fyrr. Vit kvinnur hava ofta lyndi til at snakka drongirnir í hel, hetta tíma teir ikki og ganga tí við trupulleikunum fyri seg sjálvar.

Um menn halda seg vekk, tí teir halda hetta øki vera ov bleytt, er hetta púra misskilt, heldur Anna Dalsgaard.

- Happing er alt annað enn bleytt, tað er hart og kyniskt, og drongirnir hava brúk fyri nøkrum voksnum monnum, sum tora at leggja uppí og vísa, at menn eisini kunnu takla happing og skapa trivnað fyri hvønn annan, sigur føroyski trivnaðarráðgevin.